# BØNARLØTAN

**JUNI, JULI, AUGUST** **2022** **37. árg.**

***1. dagur*** ***Róm. 12,1-21, Jer. 1.1-19, Op. 2.1-17***



*Nurimar rættlesur saman við ættarfólkinum, so dygdin verður í lagi.*



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Vit eru í Føroyum 3. juni til 20. aug. at vitja familju, vinir og samkomur. Bønarløtan heitir á samkomur at ringja á tel. 588824 ella skriva til johannuspoulsen@gmail.com at avtala vitjan ella møtir við Nurimar og Jóhannus Frants. Minnist arbeiði teirra bæði í Venesuela og Kolumbia, meðan tey eru í Føroyum.

★ 1. august fyllir Andreas Nónstein 13 ár

## KRINGVARPIÐ

| | |
|---|---|
| 5. juni | útvarpsmøti úr Lívdini |
| 12. juni | sjónvarpsandakt, Elsa í Skorini |
| 19. juni | sjónvarpsandakt, Róland í Skorini |
| 26. juni | sjónvarpsandakt, Róland í Skorini |
| 7. aug. | útvarpsmøti úr Kristnastovu |

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

***2. dagur*** ***Sálm. 28 og 29, 1. Kor. 1.1-7, Ez. 2.42-70***



## ITALIA, Molise
## Heidi og Regin Guttesen
## Megan 17, Trisha 10, Emma 6

Regin talaði í Norðuritalia 2-5. juni á stevnu og seinni eisini á ungdómstiltaki. Fyrst í juli verður dópur í samkomuni. Vit verða í Føroyum frá miðjum juli og árið at enda.

***3. dagur*** ***2. Mós.9.1-12, Jer. 2.1-18, Op. 2.18-3.6***

## ZAREPTA

Familjulegurnar halda á til 24. juni. Summarlegur eru 26. juni-14. aug. Lega fyri 18 ár og eldri 19-21. aug. Lega fyri familjur við børnum við breki 25-28. aug. Bíbliuskeið 29. aug.-4. sept. Tørvur er á leiðarum og hjálparfólki. Biðið, at Harrin signar og leiðir leiðsluna við Joen Magnus Rasmussen og hansara hjálparfólkum.



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas13, Kristina 11**

Niels Pauli hevur bíbliutímar á familjulegunum í Zarepta. Vit loysa Sólvu og Jákup Hansen av í Kristnastovu einar tvær vikur í aug.



**Sólva og Jákup Hansen**

Møtini sunnudag kl. 11 verða alt summarið. Møtini fríggjakvøld kl. 20 halda fram til 17. juni og byrja aftur síðst í aug. Vit verða í Føroyum einar tvær vikur í aug.



**Susan og Øssur Berghamar**

Andaktirnar á sjúklingahotellinum halda fram alt summarið hvørt hóskvøld kl. 20.30 við luttøku úr Kristnastovu aðruhvørja ferð. Vit sjálv verða væntandi her meginpartin av sumrinum. berghamar@kristnastova.dk



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Samkomuleiðslan arbeiðir við visjónstilgongd. Biðið um leiðslu, soleiðis at góð og bíbilsk grundað kós verður løgd. Dóttir okkara Hannah vitjaði 14 dagar heima frá Logos Hope, men siglir nú aftur til sept.

## *5. dagur* *2. Mós. 9.13-35, Jer. 2.19-37, Ez. 3.1-13*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vitjanin í Filipsoyggjum í apríl eydnaðist væl. Í Manila var sum heima; vit búðu har í 10 ár. Nú skal eg undirvísa í Alabama. Vit fyrireika heimsráðstevnu í Teilandi í nov. fyri 150-200 missiónsleiðarar og ráðgevarar. Judy hevur ábyrgdina av øllum samskifti við luttakarar og hotell. Altjóða leiðslunevndin hevur fund í aug. Tørvur er á vísdómi og einleika.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Nú er summar, og arbeiðið í Calvary heldur fram við ymiskum legum fyri børn og ung.

⋆ 5. august fyllir Karis Flanagan 9 ár

## *6. dagur* *Jóh. 7.25-53, 1. Kor. 2.1-16, Op. 3.7-22*



**PAPUA NÝGUINEA**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Næmingar hava fingið praktiska læru um mentan og mál. Nú skulu teir í fimm vikur venja seg at búgva í umstøðum við lítlum og ongum nútímans hentleikum. Eisini skulu teir læra seg eitt óskrivað sorimimál. Poul undirvísir í 2. Pætursbr. á netinum. Trúboðarastevna verður í North Cotes í juni.

## *7. dagur* *2. Mós. 10.1-20, Sálm. 34, Ez. 4.1-24*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg verði í Skotlandi til sept. fyri at fáa heilsubót. Biðið um grøðing. Málverkætlanir halda fram, og eg fyrireiki fýra daga undirvísing fyrst í juli. Eg samskifti somuleiðis við Mixtec-umsetingartoymið, nú tey rættlesa Matteusevangeliið saman við lokalum bólki.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 18, Victoria 16, Emma Grace 14,**
**Jónatan 12, Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Biðið serliga fyri Guicho og Gabriel, sum nú fara at leiða samkomuna, tí vit ætla at fara til annað stað, helst her í Michoacán, at byrja nýtt verk. Vit taka farloyvi heima, meðan vit biðja og bíða at síggja, hvussu hetta fer at eydnast.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

⋆ 7. juni fyllir Boas Jacobsen 15 ár

## *8. dagur* *Jóh. 8.1-20, Jer. 3.1-23, Op. 4.1-11*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit fara til Ikerasakt við bátinum Qaamaneq 11-21. juni. Møguliga verður dópur í summar.

**9. dagur** *Sálm. 30, 1. Kor. 3.1-23, Ez. 5.1-17*



## FØROYAR

**Birgit og Svenning av Lofti**

Aftur í ár gleða vit okkum til sangfagnað í Ebenezer 27. juli kl. 19. Umframt at syngja saman kendar felagssangir, fara vit at hoyra kendar føroyskar sangarar og sangbólkar. Biðið og bjóðið øðrum við til sangfagnaðin á ólavsøku!

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 12, Ester 11, Samuel 7**



## OM, SUÐURAFRIKA

**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Vit koma heim síðst í juni og søkja tí um, at Kurt fær innfararloyvi. Biðið, at umsóknin verður góðkend. Takk fyri forbøn og stuðul.

★ 9. juni fyllir Jenny í Prestgarði 15 ár
★ 9. juli fyllir Elliot Poulsen 6 ár

**10. dagur** *2. Mós. 10.21-11.10, Jer. 4.1-13, Op. 5. 1-14*

## NTM – FØROYAR

**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 6, Natan 3**

Nýtt bíbliuskúlaár á North Cotes College byrjar í sept. Tilmelding og kunning er á ntm.fo, skriva ntm@mail.fo ella hjá Eli á tel. 230009. Biðið fyri bíbliutýðarum og trúboðarum, ið arbeiða í vandamiklum umstøðum.

## *11. dagur* *Jóh. 8.21-36, 1. Kor. 4.1-21, Sálm. 38*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Vit ætla at týða Bíbliuna til deyvamál ymsastaðni í Europa. Vit luttaka á stevnu í Noregi 10-20. aug. Vit skipa møguliga fyri stevnu á Zarepta næsta ár.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Vit savnast sunnudagar til breyðbróting kl. 10 og til møti kl. 11 alt summarið.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Okkum leingist eftir veking millum føroyingar á Fyn.

## *12. dagur* *2. Mós. 12.1-20, Jer. 4.14-31, Hos. 1.1-11*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**
Claire er nú í bólki, sum samskipar venjing av nýggjum trúboðarum úr øllum Bretlandi. Claire fer møguliga í farloyvi í heyst fyri at dagføra handbók til nýggjar trúboðarar. Biðið og takkið fyri tey, sum fara út við evangeliinum.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Biðið, at sýningar av Jesus-filminum í fleiri saafibygdum bera ávøkst.

## *13. dagur* *Jóh. 8.37-59, 1. Kor. 5.1-13, 1. Pæt. 1.1-25*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Staðfest virus á balansunervini merkir m.a., at Páll ikki longur einsamallur kann hava ábyrgd av sigling. Biðið fyri heilsuni hjá okkum báðum. Biðið, at Harrin signar legurnar og starvsfólk, at evangeliið verður boðað greitt, og at Heilagi Andin virkar sálum til frelsu og signing.

**GRØNLAND**
**Juvel II**

Fram til 12. aug. vitjar Juvel II allar bygdir úr Nuuk og norður til Thule. Síðan verður farið til Suður- og Eysturgrønlands.

⋆ 13. august fyllir Isabel Tuohy 18 ár

## *14. dagur* *1. Kor. 7.20-40, Sálm. 35, Hos. 2.1-23*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Fýra legur eru 30. juni-26. juli. Stórur tørvur er enn á seks fólkum til køk, reingerð, umsjón o.a. til legu 1 og 2 frá 30. juni-12. juli. Hjún við børnum eru eisini vælkomin. Upplýsing og tilmelding hjá Sofus Gregersen +298 771715 ella Ragnhild í Skorini +299 486448. Tjóðardagin 21. juni er útimøti og opið hús í samkomuni. Bíbliuskeiðið er 24-27. juni.



**ÍRLAND**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *15. dagur* *Jóh. 9.1-23, 1. Sám. 1.1-20, 1. Pæt. 2.1-25*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

Vit eru takksom, at vit nú aftur sum samkoma kunnu eta morgunmat saman; tað er til stóra signing fyri samfelagið her og fyri tey, ið eru nýggj. Vit fýra fara til Simbabvi at vitja familju í summar. Tað eru meir enn fýra ár, síðan vit vitjaðu seinast.

⋆ 15. juni fylla Micah og Reuben Magura 9 ár
⋆ 15. august fyllir Victoria Tuohy 16 ár

## *16. dagur* *Sálm. 31, 1. Tim. 1.1-20, Hos. 3 og 4*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**

Í summar er breyðbróting sunnudag kl. 11 og evangeliskt møti kl. 18; mikukvøld kl. 20 bønar- og uppbyggingarmøti. Vinkelvej 2, 9850 Hirtshals; +45 98944370 og +45 40438166. Øll eru vælkomin.

**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**



Vit luttaka, sum Harrin leiðir, í verkinum her heima og í Danmark.

**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 15**

⋆ 16. juni fyllir Emma Guttesen 6 ár

***17. dagur 1. Mós. 17.1-27, 1. Sám. 1.21-2.11, 1. Pæt. 3.1-22***

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 15, Svend 13, Terji 10, Petra 8**

Summarætlanirnar fevna um vitjanir í Noregi, grønlandsferð við Juvel II, útimøtaferðir við sluppini Jóhonnu, møti í Skúgvi, umframt møgulig tjaldmøti í Hovi. Biðið eisini fyri dóttur okkara Petru, sum hevur fingið staðfest ITP, manglandi blóðplátur.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

***18. dagur Mark. 10.1-22, 1. Tim. 2.1-15, Sálm. 39***

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 14**

Biðið fyri STEVN, hirðatænastuni, mongu møtunum og framløgunum í summar. Biðið eisini fyri heilsu okkara.

**ÍSLAND, Reykjavík**
**Kristín Gerðalíð**



Biðið fyri missiónsvikuni í heyst, at fólk koma til trúgv, og at trúgvandi her verða eggjað og fáa dirvi at siga øðrum um Jesus.

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**



## *19. dagur* *1. Mós. 18.1-15, 1. Sám. 2.12-26, Hos. 5.1-15*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Biðið fyri okkum í altjóða leiðsluni hjá NTM, nú vit vegleiða, eggja og hjálpa í tænastuni, og fyri samverkamanni okkara Larry, sum hevur lungnakrabba.



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Túrurin eystanfyri eydnaðist væl – góðar samtalur og bønir, og vit býttu traktatir út. Vit fara nýggjan túr í sep./okt. Biðið, at vit fáa fólk við okkum. Vit bera nú aftur boðskapin fram á gøtunum aftur og sýna læruleikir, hava samtalur o.a. Vónandi verður hetta regluligt. Vit koma heim nakrar vikur í aug.

## *20. dagur* *Mark. 10.23-52, 1. Tim. 3.1-16, 1. Pæt. 4.1-19*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**
Vit eru nú stinnari í kovolmáli og mentan og fara tí at gera heimauppgávur í 9 mánaðir. Síðan verður toymið styrkt til at gera stavrað, bíbliuumseting og at undirvísa. Biðið, at vit fáa gott samband við øll í Týsklandi í summar, og at vit samstundis mennast.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 13**

## *21. dagur* *1. Mós. 18.16-33, Sálm. 36, Hos. 6.1-11*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah 8, Abigail 3**

Samkomulegan í mai gekk sera væl. Um 80 vóru við, eisini nøkur, ið ikki vanliga koma. Biðið, at Harrin virkar. Ungdómsbólkurin veksur, og huglagið er gott. Vit vitja í Føroyum 18. juli-4. aug. Samkoman stuðlar og eggjar Jóhannisi.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**



Fleiri bíbliuskeið á farsimáli fyri iranar og afghanar verða í Evropa í summar: tvey í Onglandi, trý í Týsklandi og fleiri í Grikkalandi.

## *22. dagur* *Mark. 11.1-14, 1. Sám. 2.27-36, 1. Pæt. 5.1-14*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

Tørvur er á sjálvbodnum at hjálpa til komandi skúlaár á venjingarmiðstøðini í North Cotes í Onglandi, fýra at hjálpa í køkinum og tveimum til barnaansing. Biðið fyri teimum, ið hava verið í tænastu uttan fyri Evropa og nú koma heim aftur.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**



## *23. dagur* *Sálm. 32, 1. Tim. 4.1-16, Hos. 7.1-16*



**FILIPSOYGGJAR**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vánalig trygdarviðurskifti umframt Covid hevur merkt, at eingin hevur vitjað á Balabac í mong ár. Tíbetur síggja vit, at onnur hava tikið við, og arbeiðið gongur framá.

⋆ 23. august fyllir Ethan Flanagan 5 ár

## *24. dagur* *1. Mós. 19.1-22, 1 Sám. 3.1-21, 2. Jóh. 1-13*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9,**
**Judah 7, Ethan 5**

Vit fyrireika farloyvi í nov. Simon arbeiðir við leiðslubólkinum á trúboðarastøðini. Týsku lærararnir hava verið okkum til stóra signing. Biðið, at vit megna at elska mengenfólkið soleiðis, at tey síggja Kristus í okkum og fara at tysta eftir Orði Guds.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 3, Evelyn 2**

⋆ 24. august fyllir Louis Hansen 5 ár

## 25. dagur *Mark. 11.15-33, 1. Tim. 5.1-25, Sálm. 40*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Matteusevangeliið er nú klárt at senda til rættlestur. Alt Nýggja Testamentið er nú umsett, men enn er nógv eftir at gera, áðrenn tað kann prentast. Í juli verður samfelagsstevna fyri trúboðarar hjá NTM í Vesturafrika. Tær 11 bøkurnar og brøvini, ið vórðu rættlisin herfyri, verða vónandi prentað í aug.

## 26. dagur *1. Mós. 19.23-38, 1. Sám. 4.1-22, Neh.1.1-11*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 8, Rio 3**

Í juni fáa vit nýggjan OM trúboðara úr Filipsoyggjum at virka saman við okkum. Jonah hevur verið í Laos í fleiri ár við OM. Biðið, at hon fellur væl til í Japan, lærir málið væl, og at vit kunnu virka væl saman. Vit vitja í Føroyum 18. juli-17. aug.

## 27. dagur *Mark. 12.1-17, 1. Tim. 6.1-21, Ef. 1.1-23*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Liz er batnað nakað, men liggur framvegis á sjúkrahúsi í Kanada. Vit vóna kortini at sleppa aftur til Filipsoyggjar. Tríggir menn, ið arbeiða saman við mær, hava vitjað fleiri samkomur, har teir ætla at undirvísa í Ápostlasøguni. Vit gleðast um teirra eldhuga og góða umdømi; tað er sum luft undir veingirnar til at halda á!

## 28. dagur 1. Mós. 20.1-18, Sálm. 37.1-20, Neh. 2.1-20

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen, Zephaniah 1**
Vit læra framvegis málið og megna nú at samskifta nakað við grannar og onnur. Fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi er neyðugt at fara av landinum 2-4 vikur í juli; helst fara vit tá til Týsklands.

## 29. dagur Mark. 12.18-44, Ez. 1.1-11, Ef. 2.1-22



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8**
Teiland letur spakuliga uppaftur eftir farsóttina. Vit hava framvegis stóran tørv á fleiri starvsfólkum til The Well International.

★ 29. juli fyllir Timon Hansen 3 ár

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087
**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

## *30. dagur* *Sálm. 33, Op. 1.1-20, Neh. 3.1-14*

### OM, LOGOS HOPE, TeenStreet

Í summar vitjar skipið havnir í Miðalhavinum. Biðið, at fleiri koma at tæna við Logos Hope, at gleðiboðskapurin røkkur vitjandi umborð, og at Logos Hope fær loyvi at vitja havnir í Norðurafrika. Biðið fyri Rutt J. Jacobsen úr Tórshavn, sum er farin á STEP-programmið við Logos Hope, og fyri Sámali Rasmussen og Hannu Berghamar umborð. Nógv ung úr Føroyum fara á TeenStreet 7-13. aug.

## *31. Dagur* *Ez. 2.1-42, Ef. 3.1-21*




### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

### NÝGGJ BÓK!

**63 síður** **80 kr.**

Timothy Keller viðger avbjóðingar, sum vit møta, tá ið vit boða evangeliið í Vesturheiminum í dag. Tað er freistandi bert at avbyrgja seg í trygga kristna felagsskapinum. Keller eggjar okkum at fara út millum medmenniskju at avspegla og kunngera kristnu trúnna skilliga og sannførandi fyri okkara egna ættarliði.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.-frí. kl. 14.00-17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos